Landslæknin

# Starvslýsing

## Landslæknin søkir eftir skrivstovufólki

Hjá Landslæknanum er eitt nýtt skrivstovustarv (kontorfunktionær) á 22 tímar um vikuna **leyst at byrja 1. september 2010.**

Vit søkja ein virkisfúsan persón, sum kann taka sær av vanligum skrivarauppgávum umframt meira sjálvstøðugum uppgávum.

**Harumframt leggja vit dent á, at umsøkjarin hevur:**

- Góðan kunnleika til føroyskt og danskt
- Góðan kunnleika til teldu, serliga forritið Word og evt. Excel og PowerPoint
- Góð evni at samskifta og samstarva
- Royndir við heimasíðusmíð er ein fyrimunur, tó ikki krav

Landslæknin er ein statsstovnur undir Ministeriet for sundhed og forebyggelse, sum vegna Sundhedsstyrelsen hevur eftirlit við tí heilsufakliga virksemi, ið lóggild heilsustarvsfólk útinna í Føroyum. Landslæknin er ráðgevi hjá danska statinum, Føroya Landsstýri og kommunalum myndugleikum í heilsuligum, hygieiniskum, sosialum og umhvørvisligum spurningum. Landslæknin ger og gevur út árligar heilsulýsingar fyri Føroyar og veitir stuðul til rættar- og løgreglumyndugleikar í rættarlæknaligum og líknandi málum.

**Lønar- og setanartreytir**
Lønar- og setanartreytir eru sambært organisatiónsavtalu millum Finansministeriet og HK/STAT.

**Kunning**
Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Lonu Johansen ella Liljan Midjord á telefon +298 311832.

**Umsóknin**
Øll áhugaði uttan mun til aldur, kyn, trúgv ella uppruna verða biðin um at søkja starvið.

Umsókn saman við avritum av viðkomandi prógvum, CV v.m. skulu sendast til:

Landslæknan, Sigmundargøta 5, Postboks 9, FO-110 Tórshavn ella við telduposti til foe@sst.dk, og verða okkum í hendi **í seinasta lagi 15. juli 2010.**